# Stjóri til Tjóðpall Føroya

**Lýst verður eftir stjóra at seta frá 1. februar 2005 ella skjótast til ber.**

Stjórin kemur at hava listarligu ábyrgdina og skal standa fyri menningini av Tjóðpalli Føroya í samstarvi við leiklista- og mentanarøkið í Føroyum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava visiónir um at menna leiklist í Føroyum og neyðuga førleikan at leggja framtíðar ætlanir fyri Tjóðpall Føroya.

**Umsøkjarar skulu hava:**
- leiklistarliga útbúgving ella royndir innan leiklist
- leiðslu- og samstarvsevnir
- innlit í fíggjarviðurskifti og fyrisiting

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt samsvarandi 36. lønarflokki hjá Tænastu-mannafelagnum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Stjóra-skeiðið er í mesta lagi 5 ár í senn.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Anniku Sølvará, forkvinnu í Leiklistaráðnum á telefon 35 25 04 ella annikas@setur.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til Leiklistaráðið í seinasta lagi 20. desember 2004.

## Leiklistaráðið
Postrúm 212
FO-110 Tórshavn

att. Annika Sølvará

---

**Tjóðpallur Føroya er almennur stovnur, skipaður við Løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003. Játtanin til Tjóðpallin er 2,4 mió kr í 2004.**

**Tjóðpallurin skal sambært lógini**
- í virksemi sínum leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði eins og stovnurin skal framføra klassisk so væl sum nútímans altjóða verk
- geva borgarunum í øllum landinum eitt breitt og dygdargott tilboð av leiklist - sjónleiki so væl sum aðrari pallist
- tryggja sjónleikarum, dansarum og øðrum leikhússtarvsfólki hóskandi arbeiðs-møguleikar til tess at menna yrkisførleikar teirra
- skipa fyri leiklistaligum útbúgvingum og eftirútbúgvingum
- fremja og menna yrkis- og áhugaleiklistina í Føroyum.

**Lógarteksturin við viðmerkingum liggur á heimasíðu Løgtingsins:**
www.logting.fo/logtingsmal/logtingsmal02/vanlig%20tingmal/093.02%20tjodpallur%20foeroya.htm

www.sansir.fo